Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 05.03.2021
Mál nr.: 21/00096
Málsviðgjørt: BAB/JEK
Eftirkannað: 25.02.2021

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald
(Rætting viðvíkjandi striking av § 3 c)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 190 frá 21. desember 2018 um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald verða § 1, nr. 2 og § 2, stk. 3 strikað.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Í sambandi við løgtingsmál 67/2020 er § 3 c í MVG lógini broytt. Broytingin er komin í gildi afturvirkandi frá 1. januar 2021.

Hinvegin er ein broytingarlóg samtykt í 2018. Hendan løgtingslóg ásetir, at § 3 c í MVG lógini skal strikast 31. mars 2021.

Sostatt verður rættastøðan, at nýggja § 3 c bert er galdandi frá 1. januar 2021 til 31. mars 2021. Hetta uppskotið strikar ásetingina frá 2018 um, at § 3 c skal fara úr gildi 31. mars 2021.

Tað merkir, at tað sum er samtykt við løgtingsmáli 67/2020 verður galdandi.

1.2. Galdandi lóggáva
Frá 1. januar 2021 til 31. mars 2021 er galdandi lóggáva:

"§ 3 c. Tann, sum keypir motorakfar, sum er fevnt av løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum, sum bert nýtir ravmagn ella vetni til framdrátt, kann eftir umsókn fáa part av meirvirðisgjaldinum endurgoldið. 1. pkt. er eisini galdandi fyri sonevnd plug-in hybrid akfør, PHEV.
Stk. 2. Í 2021 og 2022 verða í mesta lagi kr. 70.000 endurgoldnar eftir hesi grein. Í 2023 og 2024 verða í mesta lagi kr. 35.000 endurgoldnar eftir hesi grein. Í 2025 og fylgjandi ár verður meirvirðisgjald ikki endurgoldið.
Stk. 3. Fyri at fáa endurgoldið meirvirðisgjald eftir hesi grein, skal motorakfarið verða skrásett í seinasta lagi 31. desember 2024."

Frá 31. mars 2021 er ásett í løgtingslóg nr. 190 frá 21. desembur 2018, at § 3 c verður strikað.

Hendan lóg setur sostatt júst broyttu § 3 c úr gildi aftur.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Uppskotið skal rætta sólseturáseting frá 2018 um, at § 3 c fer úr gildi 31. mars 2021.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum verður broytingin í MVG lógini frá 2018 um at § 3 c fer úr gildi 31. mars 2021 strikað. Harvið er tað, sum Løgtingið hevur samtykt 18. februar 2021 eisini galdandi eftir 31. mars 2021.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur ikki verið til ummælis.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið, men ikki fyri kommunurnar.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Føroyar hava bundið seg til at fylgja Paris-avtaluni um at minka útlátið av veðurlagsgassi. Við at stuðla grønum loysnum bæði til upphiting av bústøðum og til framdrátt av akførum minkar útlátið av CO_2.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið sampakkar við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, sum eru viðkomandi fyri lógaruppskotið.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir og ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Talan er um eitt avgjaldsuppskot.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Við hesum verður lógarbroyting frá 2018 um at strika § 3 c hin 31. mars 2021 strikað.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Um uppskotið skal røkka sínum endamáli, er neyðugt, at uppskotið kemur í gildi áðrenn 31. mars 2021.

Fíggjarmálaráðið, 05. mars 2021

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Skriv frá Lógardeildini